# Føroyskur rættstavari komin

**Tað hevur verið neyðugt leingi við einum føroyskum rættstavara til teldur. Nú er Stavarin komin, og hann fæst til keyps longu nú**

MÁL
*Rógvi Borðoy*

Ein óformellur tíðindafundur varð hildin í Ólastovu fríggjamorgunin, har greitt varð frá nýggja forritinum, sum arbeitt hevur verið miðvíst við umleið eitt hálvt ár. Tað er Petur Zachariassen, sum hevur samskipað verkætlanini, og Føroya Fróðskaparfelag, sum er útgevari.

Serliga er tað tó Andrass Mortensen, programmørur, sum hevur arbeitt við Stavaranum. Hann hevur lagt eitt stórt arbeiði í verkætlanina, og frá Peturi Zachariassen fær hann nógv rós. Sami maðurin hevur eisini arbeitt við Orðaskjáttuni, sum er ein orðabók á telduni.

### Bert á alnótini

Um tú hevur hug at fáa tær forritið, skalt tú fara inn á heimasíðuna www.stavarin.fo og taka forritið niður. Síðani sleppur tú at royna Stavaran frítt í tvær vikur, og hareftir kostar hann 350 krónur at nýta.

– Tað virkar sum at keypa eina bók, sigur samskiparin Petur Zachariassen. Soleiðis skilt, at tær ikki nýtist at gjalda eitt fast gjald hvørt ár ella líknandi.

Stigtakararnir hava roynt at seta seg í samband við telduforritsfyritøkuna Microsoft fyri at fáa eitt beinleiðis samstarv við teir. Stavarin er gjørdur soleiðis, at hann riggar saman við øllum Microsoft forritum, og møguleiki er sostatt fyri, at ein fær Stavaran við, longu tá ein keypir skriviforrit frá fyritøkuni. Higartil hevur tó ikki borið til at fáa samstarv við Microsoft, tí Føroyar ikki eru ein áhugaverdur fíggjarligur marknaður.

Vónir eru tó um, at ein føroyskur telduveitari fær áhuga í at taka Stavaran við í onkran forritspakkan.

### Hvussu virkar Stavarin

Stavarin tekur orðini eitt fyri eitt og lesur tey. Um ein stavivilla tekur seg upp, kemur forritið við nøkrum uppskotum til rættingar, og har skal ein so velja burturúr. Størsti trupulleikin hjá Stavaranum er, at hann ikki lesur málløruvillur. Orðini "vera" og "verða" standa sostatt bæði sum rætt stavaði, eisini tá mállæran ikki er røtt.

Orðalistin, sum Stavarin byggir á, er rættiliga liberalur, siga stigtakararnir. Har eru ymisk orð, sum vanliga ikki eru góðkend í føroyska málinum, men har kann ein sjálvur velja, hvat orð ein vil nýta. Ein kann eisini leggja orð aftrat, um okkurt nýtt orð sær dagsins ljós.

Støðið undir Stavaranum er ein orðalisti, sum Fróðskaparsetur Føroya læt gera tíðliga í 90-árunum við fíggjarligum stuðli úr Orðabókagrunninum. Tilsamans eru 178.000 orð og orðasnið við í hesi fyrstu útgávuni av Stavaranum.

Nøvn eru við vilja hildin uttanfyri listan, siga stigtakararnir. So á telduni fer framvegis at bera til at skriva "Victoria" við "c".



*Heini Justinussen hevur lagt stórt arbeiði í at fáa Stavaran at rigga sum hann skal. Hann er programmørur, og hevði eisini ein stóran leiklut í m.a. Orðaskjáttuni.*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Koyra tíðum óforsvarligt

**Sjúkrabilaførarar síggjast tíðum koyra alt ov skjótt og óforsvarligt uttan ljós ella lúður**

FERÐSLA
*Rógvi Borðoy*

Ein dagin herfyri sá undirritaði ein sjúkrabil koyra sera hart og óforsvarligt á vegnum við Áir. Støðan var tann, at ein røð av bilum koyrdu suðureftir á vegnum, tá ein sjúkrabilur, sum eisini koyrdi suður eftir, fekk teir aftur. Mótkoyrandi ferðsla var hinumegin á vegnum, men tað forðaði ikki sjúkrabilinum í at byrja eina yvirháling, so at hann noyddist at koyra mitt á vegnum, og allir hinir bilarnir noyddust út á vegøkslina við høgari ferð.

Sjúkrabilurin hevði hvørki blunkljós ella lúður frá, og tí roknaðu bilførararnir ikki sjúkrabilin sum havandi skund.

Atli Simonsen á ambulansutænastuni sigur seg ikki kenna nakað til júst hesa hending, men hann sigur, at í hesum førinum skuldi førarin í minsta lagi brúkt blunkljósini.

### Reglur eru galdandi

Atli Simonsen sigur, at reglur eru galdandi fyri førarar á sjúkrabilum. Akkurát hvussu teir eru, veit hann ikki, men hann sigur, at tað er vanligt at koyra við blunkljósum í øllum førum, har koyrast skal ov skjótt. Í summum førum ber til at koyra uttan blunk, til dømis um sjúklingurin ikki vil hava øll at síggja, hvat hendir. Í teimum førunum skal førarin tó hava fingið loyvi frá løgregluni, sigur hann.

Hann sigur, at førarar á sjúkrabilum skula koyra undir somu reglum sum førarar í løgreglubilum, men at løgreglan til tíðir kann koyra uttan blunk, um tað er alneyðugt, at teir møta upp ósæddir, til dømis um eitt innbrot verður framt.

### Koyrilærarin

Stanley Olsen, koyrilærari, sigur at sjúkrabilar skula yvirhalda vanligar ferðslureglur, um teir ikki hava blunkljósini tendraði. Tað vil siga, at førarar altíð skula hava blunkljósini tendraði, um teir noyðast at koyra óvanliga skjótt. Hin vegin skula teir hava eina orsøk til at koyra ov skjótt. Tað vil siga, at um eingin sjúklingur er í bilinum, sum er í vanda, hevur førarin ikki loyvi til at tendra blunkljósini, og harvið skal koyrast við vanligari ferð.

Lesarar hava eisini sæð sjúkrabilar tendrað blunkljósini í einari ljóskurv. Tá sjúkrabilurin er komin ígjøgnum ljóskurvuna, sløkkir hann ljósini, og koyrir vanliga aftur. Tað kann síggja út, sum at førarin bara ikki tímir at bíða, men so er ikki, sigur Atli Simonsen.

Tað kemst av, at førararnir ikki vilja vera ov nógv til ampa við gangi. Um teir hava ein sjúkling í bilinum, sum ikki er beinleiðis í lívsvanda, kunna teir fyri at sleppa eitt sindur skjótari ígjøgnum ferðsluna tendra ljós ella lúður eina løtu, sigur Atli Simonsen.

# Tjóðveldisflokkurin vil hava aliloyvir aftur

Tjóðveldisflokkurin hevur viðgjørt spurningin um at lata peningastovnarnar fáa veðrætt í aliloyvum. Spurningurin stakk seg upp, eftir at forstjórin í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen, nevndi, at peningastovnarnir muga hava veðrætt í aliloyvunum, um teir skula tora at fíggja alivinnuna framyvir.

Tjóðveldisflokkurin heldur fast í, at aliloyvir, fiskiloyvir og onnur loyvir at nýta alment tilfeingi, eru almenn brúksloyvir, ið tað almenna eigur at bjóða út.

Í tíðindaskrivi frá Høgna Hoydal, formanni í Tjóðveldisflokkinum, sigur hann, at um ein loyvishavari gevst, eigur loyvið at fella aftur til tað almenna at bjóða út.

Ein tílík skipan fyri bæði fiskiloyvir og aliloyvir hevði givið tryggari karmar hjá bæði vinnu og fíggjarstovnum, sigur flokkurin.

Sostatt tekur Tjóðveldisflokkurin ikki undir við at lata peningastovnunum veðrætt í aliloyvum.

# Fólkafundur á Skarðinum

Árligi fólkafundurin á Skarðinum verður sunnudagin tann 3. august, um viðrar. Farið verður frá Kunningarstovuni í Fuglafirði klokkan 14.00. Á Skarðinum verður felagssangur og sjálvsagda røðan, ið hesaferð verður hildin av Helenu Samuelsen, ið eisini man eiga mong minnilig spor eftir mannagøtuni millum gomlu heimstaðir sínar, Fuglafjørð og Hellur.





*Hassjhundurin eigur ein stóran part av æruni av, at tollvaldið hevur lagt hald á yvir 40 kilo av hassji innan ein mánað. Ólavsøkuaftan varð tó einki til hundin, tí tá var hassjið blakað fyri borð*

# Hassj floymir inn yvir landið

**Ólavsøkuaftan varð enn ein hassjfongur hjá tollvaldinum – hetta er triðji stóri fongurin innan ein mánað. Samstundis varð ein heldur óvanligur smugliháttur avdúkaður**

SMUGLING
*Marjun Dalsgaard*

Mánadagin, ólavsøkuaftan, varð ein 31 ára gamal maður ákærdur fyri at hava flutt 3,283 kilo av hassji inn til Føroyar.

Hann varð varðhaldsfongslaður, men kærdi dómin fyri Landsrættin, ið síðan hevur staðfest dómin. Tann 31 ára gamli situr nú í isolatión, og skal sita í 14 dagar tilsaman.

Sama dag, 28. juli varð eisini ein útlendingur frá Sveis, sum var á veg til Íslands tikin við fimm grammum av marihuana. Hann varð burturvístur, við boðunum um, at hann ikki kann koma inn aftur í landið komandi árið.

Í seinastuni hevur tollvaldið havt úr at gera, og tey knapt 3,3 kiloini av hassji eru triði stóri fongur innan ein mánað. Tilsaman er hald lagt á yvir 40 kilo av hassji frá ferðafólki, sum eru komin við Norrønu í einum tíðarskeiði, sum eitur knapt ein mánaði.

Tann 24. juni var ein dani tikin við 20 kilo av hassji, og nakað seinni varð ein maður, sum var á veg til Íslands, tikin við 19 kilo av hassji. Enn er einki nýtt um, nær nakað víðari hendir viðvíkjandi teimum.

### Blakað fyri borð

Líkt er til, at tollvaldið við fonginum mánadagin avdúkaði ein sera óvanligan framferðarhátt hjá smuglarum, ið flyta hassj til Føroya.

Av tilvild sá ein persónur, ið kom fram við keiøkinum okkurt liggja og flóta uttan fyri grótkastið við nýggju keiina, og ein speedbát sigla rundanum.

Viðkomandi helt, at hetta sá sera løgið út og setti seg í samband við tollvaldið, sum so stóð fyri manninum, tá hann kom í land í speedbátinum.

Tað vísti seg, at maðurin í speedbátinum var tann sami, sum hevði verið fyrstur í land av Norrønu. Hann hevur eftir øllum at døma kastað eina tasku við umleið 3,3 kilo av hassji fyri borð, og hevur síðan skundað sær í land og í ein bát eftir taskuni.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, vil ikki siga um hetta merkir, at ein týdningarmikil háttur at flyta hassj inn til Føroya er avdúkaður. Av tí at rættarsakin er fyri afturlatnum hurðum, vil hann ikke geva nakra viðmerking, annað enn at hann váttar, at 31 ára gamli maðurin er tikin við 3,3 kilo av hassji 28. juli.

# Listaframsýning í Galerie Focus

Fríggjadagin 1. august lat ein listaframsýning upp í Galerie Focus í Grím Kambansgøtu 20 í Havn.

Tað eru Marius Olsen, grafikari og Andrias Andreassen, sum sýna fram. Framsýningin verður opin týsdagafríggjadag frá klokkan 14.00 til 18.00 og leygardagar frá klokkan 16.00 til 18.00 fram til tann 15. august.

Onnur, sum verða at síggja í Galerie Focus í ár eru: Amariel Norðoy, sum sýnir fram tann 10. til tann 24. oktober og Olivur við Neyst, sum sýnir fram tann 7. til tann 21. november. Frá 2. til 19. desember sýna ymisk listafólk fram.

**md**

# Vinnandi yrkjarar funnir

**Vinnararnir eru funnir í stóru yrkingarkappingini hjá Listastevnu Føroya. 126 fólk luttóku í kappingini, sum hevði til endamáls at fáa nýggjar føroyskar yrkingar til vega**

LISTASTEVNA
*Ingi Rasmussen*

Hugurin at yrkja í Føroyum er stórur.

Tað staðfestir Listastevna Føroya, nú 11 vinnarar eru funnir í stóru yrkingarkappingini, sum Listastevnan bjóðaði til.

Tá freistin fór 1. mai, høvdu 126 fólk sent 446 yrkingar inn til kappingina. Tað var tí stórarbeiði hjá dómsnevndini at finna tær 11 yrkingarnar, sum skulu lesast í Útvarpi Føroya stevnudagarnar 6. til 7 august.

Dómsnevndin, mannað við Bergljót av Skarði, Kim Simonsen og Høgna Djurhuus, grundgevur soleiðis fyri valinum:

»Vit leitaðu eftir yrkingum, sum hava poetiskan spenning og eftir yrkjarum, sum fagurfrøðiliga duga at skapa nýggjar myndir og metaforar, myndberingar. Eitt annað metingarstøði hjá okkum var frástøðan hjá yrkjarunum til evnið og eisini sjálvur formurin.

Málsliga valdu vit yrkingar, sum eru yrktar á einum ikki ov donskum máli ella á einum ov gerandisligum máli.

Vit royndu at velja yrkingar, sum umboða ymisk evni og ymsar yrkingahættir. Men góðskan í yrkingini var tó avgerandi metingarstøðið.

Viðvíkjandi innihaldi og formi var dømingin tó rættiliga opin og rúmlig.

Vit meta tó, at millum tær 446 yrkingarnar er ikki sørt av rættiliga góðum skaldskapi. Fingu hesir yrkjarar leiðbeining, kundi okkurt uppaftur betri komið burturúr.«

Listastevna Føroya verður sett í Havnar Bio 6. august, og tá verða vinnararnir kunngjørdir. Teir fáa 5.000 krónur hvør í virðisløn.

# Møllehave hevur gudstænastu sunnudagin

PRESTAVITJAN
*Heini í Skorini*

Víðagitni danski presturin, Johannes Møllehave, er í hesum døgum í privatum ørindum í Føroyum. Tó verður tað hann, sum skal halda gudstænastu í Havnar Kirkju sunnumorgunin kl. 11.

Eftir ætlan skuldi Bjarni Bæk vera maðurin, sum skal luta orð Guds frá prædikustólinum sunnumorgunin, men kendi Møllehave játtaði fyrispurninginum at bera nøkur orð fram fyri føroyingum.

Johannes Møllehave er sera virkin prestur og hevur luttikið í nógvum almennum tiltøkum, og hevur hann eisini skrivað eina ørgrynnu av útgivnum tilfari. Nú er so møguleiki at hoyra áhugaverda persónin "live exclusive" í Havnar Kirkju sunnudagin kl. 11.